

## Annika ivasom

Sunnudagin orkaði eg illa at renna, og eg helt sjálv, at okkurt var galið, sigur Annika Ljósstein, sum er ivasom undan dystinum móti Neistanum

Síðani tá hevur hon verið hjá lækna, og umframt at hon hevur fingið staðfest hjáholubruna, umframt at talan møguliga eisini er um ein ferðil av lungnabruna.

– Um dystin móti Neistanum er eitt sindur ilt at siga, hvørjum vit rokna við. Eg havi als ikki sæð Neistan í ár, so einasta, sum eg havi at ganga eftir, eru úrslitini higartil, og tey hava verið svingandi hjá báðum pørtum.

– Hinvegin spæla vit sjálvandi fyri at vinna, og hesum fara vit sjálvandi at gera alt fyri at røkka, sigur Annika Ljósstein.

Annars leggur hon afturat, at eisini Anna Kristina Samson er ivasom, eftir at hon í dystinum móti VÍF fyri viku síðani fekk hald í ryggin.



## Skal takast í álvara

Venjarin hjá vestmenningum ávarar leikarar sínar ímóti at taka ov lætt upp á dystin móti H71.

– Um leikararnir taka uppgávana í álvara, egia vit at kunna vinna dystin, men verður tað ikki gjørt, kann tað gerast sera trupult. Í fjør var um reppið, at tað kiksaði móti H71, tá vit skoraðu sigursmálið í seinastu sekundunum.

Annars heldur Hjalmar Klein Olsen, at hoyvíkingar tykjast vera betri fyri í ár, enn teir vóru í fjør, og ikki minst tykist hann vera spentur um, hvussu Halgir Dahl-Olesen fer at standa seg í ár.

*jm*

**Støðan, 1. deild kvinnur**

| | | d | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 3 | 2 | - | 1 | - | 0 | 81 | 72 | 9 | 5 |
| 2 | Kyndil | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 76 | 74 | 2 | 4 |
| 3 | VÍF | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 50 | 39 | 11 | 3 |
| 4 | VB | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 62 | 39 | 23 | 2 |
| 5 | Neistin | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 46 | 46 | 0 | 2 |
| 6 | Sóljan | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 70 | 70 | 0 | 2 |
| 7 | Tjaldur | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 52 | 97 | -45 | 0 |

**Støðan, 1. deild menn**

| | | d | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 89 | 74 | 15 | 6 |
| 2 | StÍF | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 103 | 69 | 34 | 4 |
| 3 | Neistin | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 55 | 45 | 10 | 4 |
| 4 | Kyndil | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 88 | 82 | 6 | 2 |
| 5 | H71 | 2 | 1 | - | 0 | - | 1 | 59 | 60 | -1 | 2 |
| 6 | KÍF | 2 | 0 | - | 0 | - | 2 | 43 | 58 | -15 | 0 |
| 7 | Tjaldur | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 67 | 116 | -49 | 0 |



*Orsakað av royndarvenjingini hjá Ingu Danberg í Íslandi, má Neistin vera stríðsvilja hennara fyri uttan fram til 7. november*

# Skilnaðurin er byrjaður

**Í fleiri av dystunum hetta vikuskiftið eru á pappírinum greiðir favorittar, men samstundis er talan um dystir, sum í fjør góvu oddaliðunum onkra skeinu**

Hondbóltur
*Jákup Mørk*

Nú hondbóltskappingin av álvara er komin í gongd, er munur so smátt um at koma ímillum tey bestu liðini og so hini í teimum báðum fremstu røðunum.

Hetta vikuskiftið skulu fimm dystir avgreiðast, og tað er ikki óhugsandi, at vit aftur hesu ferð fáa onkra ábending um, hvør fer at manna ávíkavist odda- og botnsessirnar, tá kappingarárið fer at halla.

### Greiðir favorittleiklutir

Hóast tað í teimum báðum kvinnudystunum, sum verða leiktir um vikuskiftið, eru greiðir favorittleiklutir, so kann tað meira enn so verða, at okkurt av oddaliðunum fer at fáa ein hvøkk. Tá Stjørnan í fjør gjørdist føroyameistari, hendi hetta, samstundis sum tær vóru fyri næsta tapinum á kappingarárinum, sum samstundis var einasta tap í endaspælinum. Mótstøðuliðið ta ferðina var júst Neistin, og ivaleyst vil Stjørnan gera alt tær eru mentar, til tess at vaska hendan blettin av sær aftur.

Sigurin hjá Neistanum í fjør prógvaði tó, at tær kunnu gera ein vørr móti øllum liðum, og sálarliga er hetta ivaleyst ein góð barlast at hava.

Neistaliðið er tó framvegis nakað skert, tí eins og í dystinum móti Kyndli mugu tær eisini sunnudagin vera Ingu Danberg fyri uttan. Honvar fyri stuttum og royndi seg hjá ÍBV í Íslandi, og hóast hetta ikki bleiv til nakað varandi samstarv, so royndi hon seg í dysti fyri felagið.

Hesin dystur varð leiktur 8. oktober, og hetta merkir, at hon ikki verður tøk hjá Neistanum fyrr enn 7. november. Hetta tí § 4, petti 1 í kappingarreglunum fyri hondbólt áseta, at tað skulu ganga í minsta lagi 30 dagar ímillum, at leikari kann spæla dyst við tveimum ymsum feløgum.

Ivaleyst ein dyggur smeitur hjá Neistanum, sum ivaleyst hevði vónað, at Inga, eins og undanfarnu árini, fór at gerast ein av týdningarmestu leikarunum á liðnum. Tað kann hon framvegis gerast, men altso ikki fyrr enn eftir 7. november.

Í hinum dystinum sunnudagin skal VÍF á heimavølli royna seg móti uppflytarunum úr Sóljuni. Á pappírinum er VÍF uttan iva favorittur, og hóast tær hava verið eina vitjan í Klaksvík, eru tær framvegis ósigraðar. Úrslitini hjá Sóljuni higartil boða tó frá, at tær væl kunnu bíta frá sær, og serliga er tað toppskjuttin í deildini, Simona Dzikgyte, sum er orsøkin til hetta.

### Spenningur á Hálsi

Hjá monnunum verða tríggir dystir hetta vikuskiftið. Uttan at vit skulu avgera hesar áðrenn teir eru leiktir, ber tó til at siga, at í tveimum av trimum førum eigur talan at gerast um greiðar sigrar til liðini, sum bera favoritt heitið.

Leygardagin vitjar Kyndil í Vestmanna, har KÍF framvegis eigur heimavøll. Hóast tað í endaspælinum í fjør var nær við, at kollfirðingar koppaðu teimum grønu, so er einki at ivast í, at Kyndil er favorittur. Dysturin í fjør prógvaði tó, at tað er neyðugt, at uppgávan verður tikin í álvara, og Kyndil sleppur neyvan eins væl sum í fjør, um ikki verður rætt atborið. KÍF tykist í øllum førum at betri fyri nú, og so er spurningurin, hvat úrslit stendst av hesum.

Sunnudagin er tað VÍF, sum eigur høllina í Vestmanna, tá H71 kemur á vitjan. Heldur ikki her eigur nakar sum helst ivi at vera um úrslitið, og spæla vestmenningar á bara nøkunlunda sama støði, sum teir hava gjørt higartil, verður talan her um greiðan heimasigur. At síggja til eru teir í løtuni nógv sterkasta manslið í landinum, og tað verður ikki roknað við, at hoyvíkingar fáa gjørt nakað, til tess at broyta um hetta.

Seinasti dysturin sunnudagin verður í Havn, har Neistin og StÍF bresta saman. Hetta líkist einum dysti, sum kann gerast rættiliga spennandi, og samstundis tykist hann eisini avgerandi fyri, hvat av liðunum megnar at fylgja við vestmenningum á stigatavuni.

Strandingar hava longu tapt fyri vestmenningum, og spurningurin er nú, um teir megna at reisa seg aftur. Ein týðandi liður í hesum er, hvørt leikandi venjarin, Costin Dumitrescu, er tøkur aftur. Sunnudagin prógvaði hann, hvussu stóran týdning hann hevur hjá strandingum, og ikki minst varð hetta sjónligt, tá hann noyddist av vøllinum.

Heimaliðið noyðist tó at vera veteranin, Kára Mortensen, fyri uttan, eftir at hann sá reytt í grannauppgerðini móti Kyndli. Ivaleyst ein stórur missur, og so er spurningurin, hvussu venjaraparið hjá Neistanum fer at loysa hendan trupulleikan.



Fótbóltsspælari uttanlands:

# Yrkisfótbólturin hevur eisini skuggasíður

**Hans Fróði Hansen er komin til ta niðurstøðu, at hann heldur vil vera partur av vanliga lívinum í Føroyum, enn at ofra familju, vinir og útbúgving uttan at hava trygd fyri, at fótbólturin fer at geva nakra serliga inntøku**

Fótbóltur
*Jóannes Hansen*

Fótbóltsspælarar við nýggjum royndum eru so smátt farnir at síggjast í føroysku feløgunum. Talan er um spælarar, sum eitt tíðarskeið hava verið fulltíðar yrkisspælarar í útlendskum feløgum, men sum síðani eru komnir aftur til Føroya, har teir spæla fótbólt og arbeiða ella útbúgva seg.

Fyrsta dømið um hetta var Allan Mørkøre, sum í summar kom aftur úr ÍBV í Vestmannaoyggjunum og í HB. Har hevur hann verið seinnapartin av kappingarárinum, samstundis sum hann hevur hildið fram við pedagog útbúgvingini. Um Allan Mørkøre aftur fer av landinum ífótbóltsørindum, er ikki greitt enn.

Næsta dømið um yrkisspælara, sum so at siga stingur í sekkin í útlandinum og kemur heim aftur á klettarnar, er Hans Fróði Hansen. Hjá Hans Fróða er trupulleikin ikki, at hann ikki sleppur upp í part í Noregi. Burtursæð frá tá hann hevur verið skaddur, hevur Hans Fróði spælt so at siga hvørja ferð. Síðani hann fyri einum ári síðani fór til Sogndal IL, hevur miðverjin spælt 22 dystir, og hann hevur skorað eitt mál.

Ítróttarsosialurin bar síðsta leygardag tíðindini um, at Hans Fróði Hansen komandi kappingarár skal spæla við B68, sum hevur gjørt avtalu við Sogndal. Sáttmálin við norska felagið var annars eisini galdandi fyri komandi ár.

Á heimasíðuni hjá Sogndal IL vóru tíðindini um Hans Fróða Hansen at lesa nú mikudagin. Har stóð, at Hans Fróði fer aftur til Føroya av familju orsøkum.

### Krevur nógv

Hesi seinastu árini hevur verið tosað og skrivað nógv um føroyskar fótbóltsspælarar, sum ætla sær av landinum at spæla fótbólt. Ungir dreingir hava fingið møguleikan at royndarvenja í stóru feløgunum. Nógvir hava ivaleyst dreymar um at liva av fótbóltinum.

Tað verður gjørt meiri burturúr teimum, sum tað eydnast væl hjá, at teir eftir nøkrum fáum árum kunnu tryggja seg fíggjarliga, enn tað verður gjørt burturúr teimum mongu, sum ikki fáa so mikið burturúr fótbóltinum, at tað kann brúkast til framtíðar trygging.

Hans Fróði Hansen duldi í fjør ikki fyri, at dreymurin hjá honum var at spæla í einum felag í bestu ella næstbestu deildini í Onglandi. Hann royndarvandi tvær ferðir í Onglandi og Skotlandi, og tá sáttmálin við Sogndal varð undirskrivaður fyri einum ári síðani, so var tað í teirri vón, at talan so at siga fór at verða um lopfjøl til bretskan fótbólt.

– Eg havi umhugsað støðuna gjølla. Avgerðin um at flyta aftur til Føroya er ikki tikin eftir einum degi. Men nú er hon tikin, og tað eri eg fegin um. Mínar royndir sum fulltíðar yrkisspælari eru, at hetta er eitt lív, sum krevur ógvuliga nógv av tær, bæði á ein og annan hátt, sigur Hans Fróði Hansen, og hann hevur einki ímóti at útgreina:

– Síðani vit byrjaðu beint eftir ársskiftið hava vit havt einar seks frídagar. Vit venja eina og tvær ferðir um dagin. Um tú skalt vera væl fyri, so krevur tað nógva hvíld, og tað er neyðugt við nógvari sjálvsdisiplin. Tað havi eg lært nógv av.

### Dreymurin er kámaður

Fótbóltslívið í Noregi hevur Hans Fróði kent soleiðis, at hann hevur verið noyddur at leggja alt í tað.

– Hjá teimum spælarunum, sum fáa so stóran ágóða burturúr, at teir kunnu tryggja seg fíggjarliga, man hetta vera at liva við. Men tað eru ikki mong feløg í Norðurlondum, har upphæddirnar eru so stórar. Í Noregi er tað bara i Rosenborg, at spælararnir vinna so mikið nógv, og mín fatan er, at tað eru heilt fá feløg í Danmark og Svøríki, har umstøðurnar eru soleiðis. Hjá teimum flestu er tað soleiðis, at teir mugu so at siga byrja av nýggjum, tá tíðarskeiðið sum fótbóltsspælari er liðugt.

– Mær dámar framvegis væl at spæla fótbólt. Avtaluna við B68 kenni eg sum stóra avbjóðing. Felagið vil kappast um FM, og eg vóni at verða ein styrkur hjá toftamonnum. Um avrikini framvegis fara at vera nóg góð til at spæla á landsliðnum, verður landsliðsvenjarin at meta um. Um dreymurin um fótbólt í útlandinum skal gerast til veruleika, so skal talan vera um eitt tilboð av tí slagnum, sum eg ikki hava sæð enn, og tað er neyvan serliga sannlíkt, at eg fari at fáa eitt sovorðið tilboð.

### Annað telur eisini

Hans Fróði Hansen er 25 ára gamal, nú hann kemur aftur til Føroya við eitt ára royndum sum yrkisspælari í útlandinum:

– Eg eri fegin um, at leiðslan í Sogndal IL hevur skilt avgerðina, sum eg eri komin til. Nú gleði eg meg til at liva sum ein vanligur føroyingur, at hava familjulív og at fara undir arbeiði og kanska onkra útbúgving. Royndirnar at liva sum yrkisspælari rokni eg við fara at verða hentar. Kanska onkur av ungu monnunum, sum hava hug at royna seg sum fótbóltsspælarar í útlandinum, fara at fregnast um mínar royndir. Tað er spennandi at fara undir eina sovorna avbjóðing. Men eg haldi, at tað skal ikki ganga ov long tíð, áðrenn spurningurin, hvussu tað verður við framtíðini, verður tikin uppaftur. Tað er stuttligt at spæla fótbólt, og kanska er tað ikki so lætt at ásanna, at yrkisfótbólturin ikki er ein dansur á rósum hjá øllum. Men tað er neyðugt at síggja veruleikan í eyguni, heldur Hans Fróði Hansen.



*At tilveran sum yrkisleikari ikki bert er ein dansur á rósum, hevur Hans Fróði Hansen ásannað, nú leiðin gongur heim aftur til Føroya*

## FLOGBÓLTUR

**DYSTIR UM VIKUSKIFTI**

**Meistaradeild, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| Leygardag | 21.10.00 | KÍ-høllin |
| | Mjølnir – Dráttur | kl. 13.00 |
| Leygardag | 21.10.00 | KÍ-høllin |
| | Fossanes – ÍF | kl. 17.00 |
| Sunnudag | 22.10.00 | |
| Trongisvágur | TB – Fleyr | kl. 13.00 |

**Meistaradeild, menn**

| | | |
|---|---|---|
| Leygardag | 21.10.00 | KÍ-høllin |
| | Mjølnir – SÍ | kl. 13.00 |
| Leygardag | 21.10.00 | Eysturskúlin |
| | Fram – Fleyr | kl. 15.30 |